# Aksel vónbrotin av sínum mistøkum

**Aksel Poulsen tapti finaluna í einmansleiki í badminton, men silvurið og bronsan til hann og Ragnar Rasmussen er tað besta úrslitið, sum føroyingar nakrantíð hava fingið á Oyggjaleikum**

BADMINTON

*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*




*Aksel Poulsen stríddist manniliga og kláraði rímiliga væl at temja sterka grønlendska spælaran, men hann gjørdi nógv mistøk, sum kostaðu stig*

**Lerwick:** Fríggjadagin spældi Aksel Poulsen finaluna í einmansleikinum í badminton á Oyggjaleikunum.

Dysturin var ímóti tí sera væl spælandi Bror Madsen úr Grønlandi, sum á veg til finaluna hevði sent tveir aðrar føroyskar spælarar úr kappingini.

Og tað eydnaðist heldur ikki Akseli Poulsen at fáa bilbukt við tann kvika grønlendska spælaran, sum vann dystin 2-0

– Eg er ikki so væl nøgdur við avrikið. Eg fylgdi planinum hjá mær við at koyra hann runt, men eg gjørdi so nógvar feilir, nógv fór út, og tað ávirkaði spælið hjá mær, og eg bleiv ósikkur, segði ein troyttur Aksel Poulsen eftir dystin. Hví endaðu so nógvir bóltar hjá tær uttanfyri?

– Kanska er bólturin í so skjótur, ella kanska eri eg í so spentur. Fyrradagin lógu allir bóltarnir beint innafyri strikuna, men í dag endaðu teir beint uttanfyri.

## Kláraði at temja Bror

Fyrsta settið vann Bror Madsen rímiliga sannførandi, men í næsta settinum fekk hann nógv harðari mótstøðu, og Aksel Poulsen var eitt skifti á odda í hesum setti. Men so kom Bror Madsen fyri seg aftur og vann eisini næsta settið.

– Hann hevur eina sera sterka forhond, sum han hevur vunnið nógvar bóltar við, men eg kláraði nokk so væl at halda honum burtur frá tí í dag. Men harafturímóti fekk hann nógv stig burtur úr mínum feilum, segði Aksel Poulsen.

*Men at vinna silvur á Oyggjaleikuum, hvussu er tað?*

– Jú, tað er ikki so galið, men nú skal eg líka koma niður á jørðina aftur.

Afturat silvurmerkinum til Aksel Poulsen, vann Ragnar Rasmussen bronsu, og tað er besta úrslitið hjá føroysku badmintonspælarunum á Oyggjaleikum.

# Bronsan í tvímansleikinum

**Borðtennis-landsliðið er í fullari ferð við heiðursmerkjasavnanina, sum helst verður tann størsta nakrantíð**

BORÐTENNIS

*Jákup/Eyðun*

**Sandwick:** Beint undan evstamarki okkara stóð greitt, at Thomas Rasmussen og Kjartan Eli Hentze høvdu tapt hálvfinaluna í tvímansleikinum á oyggjaleikum. Eftir at teir báðir einki sett høvdu mist á veg til hálvfinaluna, gjørdist mótstøðan ov sterk frá Jersey búgvum, sum í einum sera spennandi dysti vunnu 3-2. Settúrsltini vóru 7-11, 11-7, 11-7, 8-11 og 11-8.

Enn eru tó fleiri heiðursmerki á veg á borðtennis. Eftir evstamark okkara skuldu hálvfinalunar í einmansleiki spælast.

Her skulu Kjartan Eli og Thomas spæla ímóti einum pari av Jersey, umframt at teir báðir føroyingarnir eisini skulu spæla - ímóti hvørjum øðrum - í kappingini fyri einstaklingar. So har verður talan um tvey heiðursmerki, harav annað verður úr bronsu. So er spurningurin bara, hvørjum metalli seinna medaljan verður úr.



*Kjartan Eli Hentze og Thomas Rasmussen máttu í hálvfinaluni lúta fyri tveimum Jersey-búgvum*

# Gulldreymurin brast

**Heri Ziska ein av teimum døgunum, tá einki vildi bera til, og so mátti hann veittra farvæl til heiðursmerkini, sum hann mest sum hava havt fyri vana at vinna**

KRINGLUVARP

*Jákup/Jens Kristian*



*Har vildi snøgt sagt einki bera til, tá Heri Ziska hósdagin royndi seg í yndisgreinini, kringluvarp*

**Lerwick:** Frælsi ítrótturin hevur undan seinasta kappingardegnum á oyggjaleikunum framvegis ikki vunnið nakað heiðursmerki. Tað er ein støða, sum er mest sum púrasta óhoyrd fyri okkara viðkomandi, og niðurtúrurin hesa ferð varð kanska best undirstrikaður, tá kringluvarpið - diskos - var á skránni hósdagin.

Hetta plagar at vera greinin, har Heri Ziska kastar seg til gull, og sum so byrjaði kappingin eisini hampuliga væl. Heri tveitti klingruna út á 42,38 metrar, og í fyrstu atløgu rakk hetta til bronsupláss.

## Einki bar til

Men síðani gekk heilt galið. Hóast summi av køstunum komu langt úteftir, so var kósin áhaldandi skeiv. Somikið skeiv, at køstini alla tíðina lendu uttan fyri breytina, og tá verða tey altso ikki góðkend.

Heri varð eisini yvirhálaður í bronsudystinum, tá ein Cayman-búgvi streyk hálvan metur framvið, og sum eftirverandi køstini fækkaðust í tali, vaks trýstið á føroyska essinum alsamt.

Tað plagar annars at vera eitt trýst, sum Heri trívist væl við, og fleiri ferðir hava vit sæð hann kasta sítt besta kast í seinastu royndini, men altso ikki hósdagin. Hesaferð varð kringlandi verandi á breytini, men metrarnir vóru nakrir og tredivu í tali, og tað var altso ikki nóg mikið til at fáa heiðursmerki á hesum sinni. Anastasios Gimoukis av Rhodos fór hesaferð avstað við gullinum, og var besta kastið hjá honum 46,41 metrar.